## DAGSINS MEINING

# Veljarakanningar

Ikki er langt ímillum veljarakanningarnar í hesum døgum. Í farnu viku stóð ein í Fregnum. Henda kanning vísti, at andstøðan vann ein mann, og at samgongan misti ein. Nú eru útsvingini sera smá – nakað, sum eisini gjørdi seg galdandi til valið – og tí skulu allar slíkar kanningar takast við størsta fyrivarni. Eitt ella tvey prosent hvønn vegin er ikki nakað, man skal draga konklusiónir útfrá. Hesaferð gekk Tjóðveldisflokkurin eitt sindur aftur, meðan Sambandsflokkurin gekk fram, men tá prosentbroytingarnar eru so smáar, so er ov tíðliga at gera eina forsøgn um tap í hendi hjá Tjóðveldisflokkinum.

Hyggja vit eftir farna løgtingsvali, so vóru ikki tey stóru útsvingini við undantaki av Sambandsflokkinum, ið gekk nakað fram. Javnaðarflokkurin gekk 1,1% aftur, og hevur hetta verið rópt stórtap av summum. Stórtap hevur Javnaðarflokkurin ikki havt síðani 1994, tá hann bleiv hálveraður í mun til undanfarna val, eftir at hava tikið tung, ópopuler tøk, saman við Tjóðveldisflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum, so Edmund Joensen kundi koma í skorin klæðir við batnandi fiskiskapi og prísum og ikki minst einum bjargaðum banka. Um 1,1% afturgongd er stórtap, so verða nógv stórtap til næsta val, og so má ein framgongd uppá 1,1% vælsaktans eisini verða stórsigur, um sami logikkur skal brúkast.

Veljarakanningar eru sum áður nevnt rættiliga tættar, og vilja vit við hesum ávara ímóti, at tær verða tiknar sum um, at atkvøðuprosentini eru røtt við desimalum. Tann óvissan, ið altíð er í slíkum kanningum ger, at eitt desimaltal er meiningsleyst. Tá man harafturímóti fær eitt tal upp á fleiri prosent í framgongd, so kann man byrja at staðfesta eina gongd. Ikki er tað ráðiligt at hátíðarhalda egnan sigur ella brúka tølini ímóti einum mótparti við grundarlag í smáum útsvingum. Ein flokkur sum Javnaðarflokkurin hevði eina afturgongd í næstseinastu kanning í mun til valið, og stendur í seinastu kanning sama stað sum til valið. Spurningurin er so, um afturgongdin var reell, ella tað bert var ein statistisk tilfeldigheit. Spuringurin er eisini, um tað er reelt, at samgongan hevði mist meirilutan, um val var í dag. Vit hava fyrr sæð stórar broytingar í mun til veljarakaningar. Vit vita, at samgongumeirilutin er spinkul sum er, men seinasta veljarakanning er ikki nóg mikið at siga, at hann ikki er til meira – kanska verður munurin størri í næstu veljarakanning.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fólkatkvøðan um kongsjørðina

**Jóannes Patursson**

Hendrik Old, javnaðarmaður, vil hava eina fólkaatkvøðu at avgerða hvørt tann gamla "føroyska" kongsjørðin, tann núverandi landsjørðin skal einskiljast ella ei.

Uttan iva eru hugsanirnar fleiri um hetta evni, og er ikki ætlan mín her at leggja meg út í nakað orðaskifti hesum viðvíkjandi.

Tó fer Hendrik Old sera lætt um sannleikan, tá hann skírir gomlu kongsjørðina at vera.. "almenna ogn líka síðan trúbótina."

Niðanfyri fari eg at endurgeva úr bókini "FØROYA SØGA 1. Úrdráttur úr stjórnarlagnum" útgivin í 1939 eftir Jóannes Patursson.

Hvat føroysku bøndurnir máttu gjalda í jarðarleigu til kong, stendur at lesa á síðu 81 í nevndu bók.:

citat.: "Kongsleigan var tó tann útreiðslan, sum ikki minni amaði landið. Greiniligir roknskapir alt frá árinum 1584 vísa á, at kongsgóðsið í Føroyum árliga mátti útreiða til Danmarkar:

| | |
|---|---|
| 4.750 | pund av sm¿ri |
| 8.000 | g r askinn (sey askinn vi ullini ) |
| 12.000 | pund fl¿ti |
| 24.000 | pund turrum fiski (r skornum, greipa um) |
| 1.450 | pund ull |
| 220 | pund fj¿ ur |
| 1.600 | alin av tv h¿lvdum va mali |
| 60 | lomb |

Henda bókførda útreiðsla, sum verður at telja frá o.u. 1450, tá ið kongur tók jarðarinntøkurnar av tí føroyska bispastóli47, og til 1855, tá ið hesin avskurður varð skiftur um við pening og síðan hevur verið latin í peningi, er av kønum monnum við rentu og rentu av rentu roknaður í milliardir av krónum." citat endar.

Sum skilst var tað henda árliga útreiðsla í "loyvdi" bøndunum at gagnnýta føroyska tilfeingi.

Síða 82 í somu bók; nýtt citat.: "Í Dagblaðnum 5. aug. 1938 hevur navngivin maður ávíst, at um eitt annað land t.d. Danmark skuldi útreiða eina landsskuld út av landinum í sama muni sum Føroyar, hevði lutur Danmarkar verið at lata árliga:

| | |
|---|---|
| 3.500.000 | pund sm¿ri |
| 5.500.000 | sey askinn |
| 9.000.000 | pund fl¿ti |
| 175.000 | pund fj¿ ur |
| 18.000.000 | pund turrum fiski (grei aum ella r skor num) |
| 1.000.000 | alin tv h¿lvdum va mali |
| 1.000.000 | pund ull |
| 35.000 | lomb |

uttan oyris virðið aftur fyri. Tað er ikki óhugsandi, heldur hesin rithøvundur fyri, at um ein tílík rúgva varð útreidd av Danmark á hvørjum árið í 3-400 ár uttan endurgjald, at tað tá ikki mundi verið so væl statt í tí nú so múgvandi Danmark, sum tað er." citat endað.

viðv. [47] stendur henda viðmerking.: "Mannasøgn er, at kongur ikki einans tók teir bóndagarðarnar undir seg, ið skattaðu til bispastólin, men at fútarnir eisini løgdu eftir óðalsgørðunum. Soleiðis skuldi allur Kollafjørður fara undir kong, ein hálvmørk undantikin, meðan Funningsbóndin við øksini í hond bjargaði Funningi. Henda frásøgn samsvarar brøvunum í ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn, har kongur m.a. 2 nov 1559 sigur frá at bøndur í Føroyum klaga um, at fútin koyrir teir av gørðunum. 5 mars 1565 áleggur teimum órættvísan skatt. 26 apríl 1568 at Anders Jute tekur (ejendommen) garðarnar frá bóndunum. Samanber eisini Lukas Debes, Færøernes beskrivelse; frágreiðingina um løgtingssendinevndina í 1662 til kong við kærumálum um óskilið við gørðunum, leiguni, yvirvekt, mutur, o.s.fr, sum Griffenfelt hjálpti til at avbøta við skipanini 16 apríl 1673. Henda mann, sigur Lukas Debes; føroyingar eiga at minnast so leingi Føroyar standa.

Hetta er endurgivið orðarætt. Eisini skal viðmerkast at henda bók kom út í 1939.

Hann, ið billar fólki inn at, tann føroyska kongsjørðin hevur verið almenn ogn síðan trúbótina, fer alt ov lætt um sannleikan. Undir øllum umstøðum varð hon ikki at rokna sum almenn FØROYSK ogn.

Nei, ov stór var henda inntøka fyri kong, at tá donsku bøndurnir vóru leysgivnir longu í 1786, lat kongur føroyingar trælka, enn sum fyrr, undir hesum ótrúliga okið.

So um Hendrik Old vil hava fólkaatkvøðu um einskiljing av jørðini, er ikki tá rættast at hann letur danir halda hesa fólkaatkvøðu, tí tað var danakongur, ið tók allan ágóðan av føroysku kongsjørðini hetta tíðarbil Hendrik Old umrøður.

Eitt er vist, framburðurin í danska landbúnaðinum tók ikki dik á seg, fyrr en bøndurnir vórðu loystir úr hafti í 1786. Teir duga tí at síggja virðið av frælsinum, og høvdu ongantíð aftur farið undir kong, tískil hevði úrsliti av hesi fólkaatkvøðu verið JA.

Eisini kann viðmerkast, at hvørki kongs- ella óðalshagi kann vitjast uttan bóndans loyvi. Ongum er loyvt at fara av almennari varðagøtu uttan loyvi frá jaraðareigaranum. (Her standa óðals- og kongsbøndur javnbjóðis í rætti.)

So tó at kongsjørðin er almenn ogn, er ikki harvið loyvið givið almenninginum at ferðast sum honum lystir.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Enn ein nýggj ruta

**Atlantsflog hevur latið sína tíggjundu nýggjar rutu upp. Hesaferð til Gardemoen í Oslo**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Gardermoen:** Rutan millum Vágar og Gardermoen er tann tíggjunda, sum Atlantsflog letur upp. Onkur er hildin uppat aftur, men tær flestu eru enn virknar.

Væl av fólki var í flogfarinum, sum lætti úr Vágum leygardagin við kós móti Gardermoen. Og sum skiltist á leiðsluni í Atlantsflogi, eru vónirnar góðar um, at tað fer at halda fram soleiðis.

Flogskipari á fyrsta túrinum beinleiðis millum Føroyar og Oslo var veteranurin hjá Atlantsflog, Hans Hansen.



*Hans Hansen hevur júst sett flogfarið hjá Atlantsflog á Gardemoen flogvøllin á fyrstu beinleiðis ferðin millum Vágar og Oslo*

*Mynd. Edvard Joensen*




*Søguliga ljóstalvan, sum vísir beinleiðis samband millum Oslo og Føroyar. Norðmenn skriva Færøyene á norskum og ikki Faroe Islands, sum annars er vanligt at síggja*

*Mynd: Edvard Joensen*

Hann greiddi frá, at hann hevur flogið, hvørja ferð ein nýggj ruta er latin upp, so hetta er hansara tíggjunda nýggja ruta fyri Atlantsflog.

Hans Hansen heldur tað vera rætt at lata rutur upp við miðstøð úr Føroyum, tí tað er har, felagið er skrásett, og haðani skulu vit arbeiða. Bæði í eystur og vestur, sum hann tekur til.

Hann vísir á, at millum Bretland og Føroyar er væl av samferðslu. Í grundini meira enn fólk geva sær far um, sigur hann, og eisini Ísland er ein vaksandi marknaður, sum enn meira eigur at fáast burtur úr, heldur royndi flogskiparin hjá Atlantsflog.

# Atlantsflog í Oslo

**Atlantsflog fleyg leygardagin fyrsta almenna túrin á beinleiðis rutuni millum Vágar og Gardermoen**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Gardermoen:** Atlantsflog er farið undir beinleiðis flúgving millum Vágar og Oslo. Leygardagin varð farið fyrstu ferð úr Vágum við kós móti Gardermoen flogvøllinum í Oslo.



*Bjørn Vinge fekk handaðan grindareiðskap frá Atlantsflog*

*Mynd: Edvard Joensen*

Í Oslo varð skipað fyri móttøku, nú nýggj ruta varð stovnað. Bæði flogvallarleiðslan, SAS, sum er umboð hjá Atlantsflogi í Gardermoen, felagið, sum letur mat umborð á flogførini, og so nakað so sjáldsamt sum eitt vinafelag hjá Atlantsflogi í Oslo vóru umboðað á flogvøllinum.

Røður vórðu hildnar, og gávur vórðu handaðar, eins og okkurt fekst at koyra í munnin.

Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi, helt í røðu síni fyri, at nú komu føroyingar aftur til tað gamla hjálandið, Føroyar høvdu, tá Sverri kongur fór úr Føroyum til Noregs og legði landið undir seg. Hesaferð var tað tó sum samstarvsfelagi.

Bjørn Vinge, tekniskur stjóri á Gardermoen, fekk handað eina eftirgerð av føroyskum grindareiðskapi.

Bjørn Vinge segði, at tað er altíð hugaligt, tá ein nýggj ruta verður latin upp. Tað hevur reklamuvirði, hóast rutan er lítil. Og góðari og positivari umrøðu hevur flogferðslan sanniliga brúk fyri í hesum døgum, segði hann.

Hann fegnaðist um, at ein ruta út vestur í hav nú er latin upp, hóast hendan ikki er tan fyrsta tann vegin kortini, segði han. Icelandair flýgur millum Oslo og Keflavík, segði hann.

Gardemoen flogvøllurin vað latin upp tann 8. oktober 1998, greiddi B Bjørn Vinge frá. Í dag er flogvølluin tann triðistørsti í Norðanlondum. Kastrup og Arlanda eru størri.

Tað ferðaðust í fjør 14 milliónir ferðafólk um flogvøllin í Gardermoen, segði hann. Daglaga koma og fara 550 flogfør um vøllin.

# Grind

**Fyrsta grindin í ár doyði gjáranáttina í Sandavági. 86 hvalir vórðu merktir og skiftir í drápspartar**

GRIND
*Edvard Joensen*



*Í jóansøkudimminum eru hvalirnir teggjaðir upp niður við bryggjuni í Miðvági*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Sandavági:** Tað var at loypa á dyr, tá grindaboðini komu. Oman í bátahylin og sleppa sær inn í ein bát, sum var á veg í grind.

Vit fara spakuliga út við landinum. Lurtað verður á VHF'inum eftir, hvar grindin man vera, og skilja, at hon liggur nakað vestur úr Koltri einar seks fjórðingar úr Presttanga.

Vit halda spakuliga móti einum báti, vit síggja, og halda, at tað man vera hann, sum sigur seg liggja hjá grindini.

So vælsignað veður, sum tað kann vera á jóansøku. Stilli og klárt, so góð líkindi eru at reka.

Tosa um streym, og hvussu rekur. Eystfallið er ikki rættiliga liðugt, men tað átti at borið til a fingið hana vestur yvir kortini.

Jú, tað er skjótt, so siga teir, at nú er hon hálvansætta fjórðing úr Tanganum, so tað gongur rætta vegin.

Og tað var skjótt sum í grindavísuni, at:

»En Båd í den stille Morgenstund, begyndte de hvaler at drive, men da de var komne nord i Sund, var Baadene tresendstyve.«

Hóast nú var nátt, og vit vóru á veg á Sandavág, líktist støðan rættiliga nógv.

Einar tvær ferðir vendi hon og kom upp aftur aftan fyri bátarnar, og tikið var í ørindi um, at nú...» blev den bange og vendte.«

Men aftur gekk sum í vísuni, at .. »dog for silde den Flugten tog, ej længere Vejen var aaben,« tí bátarnir vóru nógvir og gingu skjótt, so tað var reiðiliga skjótt, at hon var innan fyri Tangan, og »tá er hon í pottinum«, siga vágamenn.

Hildið varð til á Sandavági beinanveg, og tað gekk skjótt og væl. Sleipað varð síðan inn á havnarlagið í Miðvági, har seðlarnir komu úr tíðliga mánamorgunin.